# Á ævintýrferð um



*Eyðun og Joey royndarvenja*





**Leiðin umvegis teir størru býirnar**

**Peru**
**Huancayo - Ayacucho - Abancay - Andahuaylas - Cusco - Puno**

**Bolivia**
**La Paz - Oruro - Challepata - Salinas - Jiriri - Uyuni - Tupiza - Villazon - Tarija - Villamontes**

**Paraguay**
**Mariscal - Filadelfia - Asuncion**

**22 ára gamli havnarmaðurin, Eyðun Müller Thomsen, hevur ferðast á Tuk Tuk prutli tvørtur um Andesfjøllini, ein túrur uppá fimm túsund kilometrar. Hetta er ein dreymur, sum er vorðin veruleiki fyri Eyðun**

DREYMAFERÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Útlongsul er nakað, tey flestu kenna, men sum tey fægstu tó føra út í lívið. Ein teirra er tó Eyðun Müller Thomsen úr Havn, sum seinastu mánaðirnar hevur ferðast í Suðurameriku tvørtur um Andesfjøllini á prutli, einum sonevndum tuktuk.

Eyðun hevur verið partur av einum størri bólki, sum hevur koyrt leiðina úr Peru til Paraguay umvegis Bolivia.

Ferðin byrjaði við, at allir luttakararnir savnaðust í Huancayo í Peru, har teir nýttu nakrar til at aklimatisera seg. Frammanundan hevði Eyðun tó ferðast gjøgnum Chile og Peru og har upplivað eitt kend støð frá Inkatíðini.

– Eg og Joey úr Hálandi komu við hvør sínum flogfari úr Europa og møttust í Santiago í Chile. Teir koyrdu fram við strondini allan vegin upp til Peru. Veðrið var gott, 30 stig og meiri, men inn ímillum var glopraregn og tað pøsti niður.

Í dagbók síni, sum hevur verið løgd í á heimasíðuna hjá tiltakinum sohvørt skrivar Eyðun m.a. fyri trimum vikum síðani: - Fimm tey heitastu støðini á jørðini í síðstu viku vóru øll her í Peru. Mesti hitin var 44 stig, men annars er alt talan um býir, ið vit skulu tuktukka ígjøgnum. Eitt nú hava vit vitjað í Cusco, høvuðsstaðinum hjá inkarunum, til Ayacuchu, høvuðsbýurin hjá »Skínandi gøtuni«-guerilliaini.

Honda fyritøkan, ið skuldi útvega øll tey 62 tuktuk prutlini, hevði av einihvørjari orsøk ikki latið tey til tíðina, og tí varð ferðin útsett eina viku. Hetta gav Eyðuni og Joey, hollendska makkara hansara, stundir at uppliva ymiskt, ið teir annars ikki høvdu fingið stundir til.

**Nær við avlýst**

– Cotahuasi Canyon, djúp-



*Undan Tuk Tuk ferðini nýtti Eyðun høvi at vitja eitt av heimsins undirverkum, tann gjøgnum fleiri hundrað ár fjalda Inkabýin Machu Picchu.*



*Eyðun við róðrið á veg upp í Andesfjøllini*



*Tuk Tuk fráferð í Peru*



*Teir fylgjast í byrjanini*



*Eyðun fær sær ein lúr*